


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Føroyar – Danmark

**Í semju eigur nýggjur sáttmáli millum Føroyar og Danmark at vera staðfestur**



Val

BJARNI DJURHOLM

Í hesum valskeiðinum eru framdar fleiri yvirtøkur enn í undanfarna. Yvirtøkulógin gjørdist vegamótið í so máta. Lógin tryggjar, at løgtingið einsamalt ger av, at øll málsøki, undantikin tey, sum eru karmar um ríkiseindina, kunnu yvirtakast við teirri fylgju, at løgtingið rindar fyri útreiðslurnar, ið fylgja við teimum.

Í hesum sambandi er fráboðan send ST um, at føroyingar hava ómissandi sjálvsavgerðarrætt sambært altjóðarætti, og har tað eisini er ásett, at Føroyar eru ein tjóð. Henda fráboðan er søgulig og hevur stóran politiskan týdning.

**Nýggjur sáttmáli**
Komandi landsstýri eigur at taka stigið at fara undir samráðingar við danir um skipan av nýggjum sáttmála. Verandi skipan, har partarnir eru samdir um at vera ósamdir, er ikki haldgóð í longdini.

Tí eigur nýggi sáttmálin millum Føroyar og Danmark at tryggja frælsan felagsskap landanna millum.

Tá verða Føroyar viðurkendur partur í altjóða høpi, ið hava myndugleika at skipa fyri millumtjóða avtalum á stjórnarstigi. Hetta fer at hava avgerandi týdning, vilja vit limaskap í t.d. ES.

Røkka vit hesum málinum í komandi samgongu, so eru viðurskiftini millum Føroyar og Danmark komin á beint med alla. Við slíkari skipan gera vit sáttmála millum javntstillaðar partar.

Ein skipan, sum nú er búgvin at fremja, ikki minst tí at danir í komandi samstarvi við ES eisini síggja tað skilagóða í at endurskoða viðurskiftini við Føroyar.

Tí liva vit í einum søguligum tíðarskeiði, har vit í sátt og semju kunnu gera endaligan sáttmála við danir. Henda leiðin er gongd, velja vit samráðingarnar heldur enn konfrontatiónina.

# Brand fyri annað land



Val

BJØRT SAMUELSEN
Tjóðveldi

Ein av okkara allar bestu svimjarum, Elspa Mørkøre, er flutt av landinum fyri at fáa betri møguleikar at menna sítt stóra svimjitalent. Hetta er ein møguleiki, sum vit sjálvandi eiga at stuðla Elspu 100% í. Men prísurin fyri møguleikanum at koma á danska landsliðið er høgur - fyri Elspu og fyri okkum. Tí, tað verður “Der er et yndigt land”, ið fer at ljóma og Dannebrog, ið fer at veittra, hvørja ferð Elspa fer at stíga uppá sigursskamlarnar kring um í heiminum.

**Okkara brand**
Okkara land er okkara besta “brand”. Men alt ov ofta fáa vit ikki nýtt hetta virðismikla brand, tí vit eru ikki nakað land í eygunum á hinum, eitt nú altjóða olympisku nevndini, IOC. Vit mugu leggja alla orku í at finna eina loysn, har til ber at samstarva við grannalondini um elituvenjing, uttan at prísurin skal vera at frásiga sær sín egna tjóðarsamleika.

**Betri umstøður**
Tað fer altíð at vera ein stór avbjóðing at geva okkara svimjarum somu sømdir og venjingarumstøður sum í stórum londum. Men vit eru í dag sera langt frá at geva teimum bara rímiligar umstøður. Eitt nú mugu ungu svimjararnir í Havn upp á miðjari nátt, tí at venjingartíðirnar í svimjihøllini í Gundadali eru so avmarkaðar – og hetta sæst eisini aftur í úrslitunum. Okkara elitusvimjarar, eitt nú Elspa Mørkøre og Pál Joensen eru, hóast avmarkandi kamar, komin langt.

Ein nýggj svimjihøll við 50 metra breyt, og við umstøðum til professionella venjing hjá svimjarunum, má vera næsta stigið. Samstundis við at vit leggja eina tjóðarætlan fyri alla ítrótt, so vit skapa karmarnar fyri breiddina, ið gevur møguleikarnar - eisini fyri talentini. Tað skylda vit ikki einans Elspu, Pál og hinum av okkara fremstu ítróttarfólkum. Tað skylda vit okkum sjálvum.

# Viðgerðartrygd fyri sjúklingar innan 4 – 8 vikur



Val

HANS PAULI STRØM
landsstýrismaður
Javnaðarflokkurin

Ein føroyskur sjúklingur skal hava lógarásetta trygd fyri at fáa ta viðgerð, sum er neyðug, og at hon skal veitast innan eina ásetta tíð, sum 4-8 vikur.

Kann viðgerðin ikki fremjast á ávísta sjúkrahúsinum innan ásettu tíðina, so skal sjúklinginum standa í boði at fáa hetta gjørt á øðrum sjúkrahúsi í Føroyum, um tað er møguligt at fremja viðgerðina har.

Tí skulu serlæknar og onnur starvsfólk kunnu flyta millum sjúkrahúsini. Um neyðugt skulu vit so eisini kunna fáa serfrøðingar úr útlondum higar at fremja viðgerðina í Føroyum. Hetta gera vit longu sum nú er á fleiri økjum.

**Økt trýst um at hava neyðugan førleika í Føroyum**
Men kann viðgerðin ikki kann fremjast í Føroyum innan ásettu tíðina, so skal sjúklingurin kunna fáa tilboð um at fáa viðgerðina uttanlands. Tí eigur man at vera greiður yvir, at hetta kann økja um uttanlandsútreiðslurnar. Hinvegin kann tað eisini styrkja innsatsin fyri at økja um fakligu førleikarnar í Føroyum.

Áðrenn viðgerðartrygd kann ásetast, skal sjálvsagt gerast eitt stórt fyrireikingararbeiði, við at lýsa, hvørjar treytir skulu lúkast, bæði læknafakligar, starvsfólkaligar, heilsupolitiskar og ikki minst fíggjarligar. Tí skulu vit fyrst seta tíð av til hetta útgreiningararbeiðið, so at viðgerðartrygd við tíðarfreistum kann ásetast við lóg. Politiska ynskið kundi verið at hetta kann setast í verk við gildi frá jan. 2010.

**Viðgerðartrygd innan 4-8 vikur**
Í viðgerðartrygd skal skiljast millum lívshóttandi og ikki-lívshóttandi sjúkur, soleiðis at neyvari reglur og tíðarfreistir verða ásettar fyri lívshóttandi sjúkur so sum krabbamein og ávísar hjartasjúkur.

Uppskotið er at áseta viðgerðartrygd innan 4-8 vikur. Harumframt trygd fyri eftirviðgerð innan 4 vikur. Hetta kann útgreinast við hesum tíðarfreistum, eftir fyrimynd í donsku skipanini:

**Lívshóttandi sjúkur**
Til forkanning: 2 vikur frá tí at sjúkrahúsið hevur fingið ávísingina til kanningardagin.

Til skurðviðgerð: 2 vikur frá tí at sjúklingurin hevur givið samtykki, til dagin, ið verður settur fyri skurðviðgerðina.

Til medisinska viðgerð sum fyrsta viðgerð: Í mesta lagi 2 vikur frá tí at sjúklingurin hevur givið samtykki til viðgerð, til byrjunardagin sum verður tilboðið í sjúklinginum, og í seinasta lagi 4 vikur til deildin hevur móttikið ávísing til viðgerð.

Til stráluviðgerð sum fyrsta viðgerð: 4 vikur frá tí at tann viðgerðandi deildin hevur fingið ávísingina.

Til eftirviðgerð: 4 vikur frá tí at tann eftirviðgerðandi deildin hevur fingið ávísingina.

**Ikki-lívshóttandi sjúkur**
Seinast 8 dagar eftir at sjúkrahúsið hevur fingið ávísingina hjá einum sjúklingini skulu tey boða frá, um tey kunnu bjóða viðgerðina innan ásettu viðgerðarfreistina. Í Føroyum eiga vit at seta hesa til 2 mánaðir at byrja við. Og so stytta hana til 1 mánað, tá vit hava møguleikar fyri at lúka neyðugu treytirnar. Tá tað kann verða neyðugt við nýggjum forkanningum, má leggjast upp fyri tí í ásettu tíðarfreistini.

**Fyritreytir fyri viðgerðartrygd í Føroyum**
Umframt aðrar heilsufakligar og heilsupolitiskar er ein av fyritreytunum fyri at kunnu áseta viðgerðartrygd, at vit kunnu gera nágreiniligar bíðilistar. Enn hava vit ikki nakra skipan til hetta. Men tað fer at broytast, tá Talgilda Heilsuskipanin er tikin fult í nýtslu á teimum 3 sjúkrahúsunum. Og hetta verður ætlandi klárt síðst í komandi ári. Tá kunnu vit eisini krevja, at bíðilistar verða gjørdir út frá einsháttaðum mannagongdum, sum er ein av treytunum fyri at seta formlig krøv um viðgerðartrygd í verk.

**Eitt krav til politisku skipanina**
Krav um viðgerðartrygd innan ásetta tíð er eitt politiskt krav til heilsuverkið. Men uppaftur meir er tað eitt krav til politisku skipanina, at skapa neyðugu heilsufakligu, starvsfólkaligu, heilsupolitisku og ikki minst fíggjarligu fyritreytirnar, fyri at hesin møguleiki kann setast í verk.

# Íverksetananarmentan í fólkaskúlarnar



Val

HANS A. NORÐFOSS
Valevni Fólkaflokksins

Fólkaflokkurin hevur altíð tryggja bestu møguligu treytir tá tað kemur til íverksetan, og tað má sigast at íverksetanarmentanin sum vit síggja í dag er ein beinleiðis avleiðing av tí arbeiði sum Fólkaflokkurin hevur framt.

Vit vilja framvegis menna og styrkja íverksetaramentanina í Føroym. Við millum annað at gera vinnulív til ein part av okkara skúlagongd, har vit geva okkara ungu ein verðuligan smakk av hvat tað er at stovna og reka eina fyritøku, kunnu vit styrkja enn meria um okkara búskap og vónandi fáa meira enn tað eina beini at standa á.

Skulu vit gera vinnlív til ein part av okkara skúlagongd, skal hettar verða við tøttum samstarvið við vinnuna og hettar skal ikki bert vera ein bóklig framløga sum ikki gevur næminginum meira enn grundstøðið undir vinnulívinum, men ein skipan har tað eru vinnulívsfólk sum virkið læra og hjálpa næmingunum. Tað kundi eisini verði stuttligt um, millum annað, framhaldsdeildin sleppur at royna tað bókliga í verki og hava evnisvikur í hesum.

Nøkur sum fara á FHS eftir lokna fólkaskúlaútbúgving sleppa at royna gjøgnum eitt heilt ár at reka eina fyritøku í kapping, ”Ungt Virkið”, og við at geva teimum holla vitan líka frá fólkaskúla kunnu tey í betri mun gera eitt gott virkið sum eisini kundi virka eftir handilsskúlaútbúgvingina.

Hettar, og mangt annað, vil eg arbeiða fyri, um eg fái ein møguleika eftir valið 19. januar 2008.

Gleðilig Jól og eitt av Harranum signað nýggjár, og gott val 2008.